# Fekk eina dóttur og misti mannin

**Hvat er at gera, tá lívsinnihaldið broytist totalt, og tú stendur einsamøll eftir við tveimum smábørnum? Tað sigur Beinta Laursen frá í samrøðuni. Hon hevur ferðast víða seinastu 15 árini. Eftir lokna útbúgving í Keypmannahavn gekk leiðin til Bosnia og haðani til Grønlands. Nú hevur Beinta Laursen keypt hús í Havn og stovnað "fysioterapi við Havnará" í hugnaligu sethúsunum við Hoydalsvegin**

## Samrøða



Dagny Joensen

Beinta Laursen er 39 ára gomul og eigur tvær døtur. Annika er níggju ára gomul og lítla Bjørg hálvtannað ár.

Tá hon í síni tíð skuldi fara undir útbúgving, ætlaði hon at lesa sjúkrarøktarfrøði fyri seinni at fara út í heim at arbeiða. Tíverri dámdi henni ikki at síggja blóð, og fór hon undir at lesa til fysioterapeut í Keypmannahavn.

Hon var liðug útbúgvin í 1994, men í útbúgvingartíðini setti hon seg í samband við leiðaran av hjálparfelagsskapinum "Læknar uttan landamørk". Tað førdi hana í 1996 til Bosnia. Seinastu 10 árini hevur hon búð og virkað í Grønlandi.

Eftir lokna útbúgving fór Beinta Laursen í starv á Hvidovre sjúkrahúsi, har ein deild júst var stovnað fyri sjúklingar við heilabløðing og blóðtøppum. Á deildini vóru talipedagogar og ergo – fysio terapeutar. Deildin var stovnað fyri at kanna, hvussu væl sjúklingar kundu koma fyri seg, um teir fingu bráfeingis hjálp og venjing. Úrslitini vóru sera góð, og tað vísti seg, at nógv fólk komu væl frá sjúkutilburðunum.



*Beinta Laursen: - Tað var so løgið, at eg ikki dugi at siga frá, hvussu tað kendist – fyrst at hava fingið góð boð um barnsburðin og so í sama mundi at fáa skelkandi vitanina um at maður mín ikki fór at liva*

### Starv í Bosnia

Tá Beinta á fyrsta sinni vendi sær til felagsskapin "Læknar uttan landamørk", hevði hesin ikki royndir at senda aðrir fakbólkar enn læknar og sjúkrasystrar út í onnur lond at arbeiða, men í 1996 vendi leiðarin fyri deildina í Danmark sær til hennara. Hon tók av tilboðinum at fara til Bosnia at arbeiða. Beinta fekk til uppgávu at stovna fysioterapi í Gorazada, einum lítlum býi við 5000 íbúgvum, umleið tveir tímar frá Sarajevu. Hospitalið í býnum var bumbað, og nógv fólk vóru komin til skaðis, sigur Beinta Laursen og heldur fram:

- Endamálið við felagsskapinum var m.a. at læra upp íbúgvar á staðnum, sum kundu halda fram við virkseminum, tá ið vit fóru avstað aftur. Eg lærdi eina bosniska gentu arbeiðið.

- Hetta var eftir, at Dayton avtalan varð undirskrivað, og har var rættiliga friðarligt. Í landinum búðu mest muslimar, men eisini serbar í einum øki. Høvdu vit ørindi eitt nú í Sarajevu, sum var ein koyritúrur umleið tveir tímar burturi, skuldu vit gjøgnum eitt øki, har serbar búðu. Tá noyddust vit at koyra í konvoy fyri at sleppa higar, sigur Beinta Laursen.

- Í Gorazade vóru psykiatarar og sálarfrøðingar, sum góvu bráfeingis hjálp, og síðani annað starvsfólk, eitt nú fysioterapeutar, sum kundu venja og styrkja sjúklingarnar upp aftur.

- Vit fingu stovnsett eina góða og væl virkandi fysioterapideild. Umframt tað fóru vit eisini út á bygdir, sum lógu avbyrgdar frá hinum partinum av landinum.

- Tá vit fóru út, høvdu vit tulk og vegleiðara við okkum. Bilurin varð settur einar tveir tímar frá eini bygd, og so fóru vit til gongu eftir einari smalari rípu í landslagnum, av tí at landminur vóru í økinum.

- Sum flest allastaðni, so vóru smábygdirnar ikki so væl útbygdar sum inni í býnum. Eitt nú tá eg vitjaði ein 12 ára gamlan brekaðan drong, var tað avmarkað, hvat vit kundu gera.

- Tey brekaðu á bygd vóru fyri tað mesta hildin innandura. Tað bøtti heldur ikki um at geva teimum ein koyristól, tá bert moldvegir vóru í bygdini. Tað besta, vit kundu gera, var at geva teimum ein góðan stól at sita í og tílík hjálpitól, sigur Beinta Laursen.

- Henni dámdi væl í Bosnia og umhugsaði at leingja um tíðina har, men fór ístaðin til Grønlands at arbeiða á sjúkrahúsinum í Juleanehåb, har hon starvaðist í tvey ár.

### Úr Bosnia til Grønlands

Í Bosnia hitti Beinta Laursen fyrsta mann sín, sum var ættaður úr Sweits. Tey giftust og fingu dóttrina Anniku og fóru saman til Grønlands og arbeiddu á sjúkrahúsinum í Juleanehåb.

Árið eftir fóru tey hvør til sítt, og maðurin fór heimaftur. Beinta varð verandi í Grønlandi og hitti har Ova Laursen. Hann var dani, og hevði arbeitt sum tryggingarmaður, áðrenn hann keypti eitt hotell í Juleanehåb. Tað kravdi stórar ábøtur, og Beinta fekk til uppgávu at innrætta og nútíðargera hotellið. Hon gavst í sínum faki og fór tá undir at arbeiða innan hotelyrki tey næstu trý árini.

- Hotellvirksemi er eitt stræví arbeiði, har tú ert til arbeiðis at kalla allan sólarringin, sigur Beinta og heldur, at hetta yrkið meira er ein lívsstílur enn eitt vanligt arbeiði.

- Tað var eisini strævið, av tí at grønlendska arbeiðsmegin oftani er so óálítandi. Tað tók mær trý ár at fáa góð starvsfólk, sum kendu ábyrgd og komu til arbeiðis eftir avtalu.

- Ætlanin var, at eg sum fráleið skuldi arbeiða hálva tíð á hotellinum og hin partin við fysioterapi, og tí innrættaði eg eisini fysioterapi og wellness stovu á hotellinum.

- Tíverri skuldi tað ikki ganga eftir ætlanini, og alt broyttist eftir lítlari løtu, sigur Beinta Laursen.

### Boð um lív og samstundis deyða

Eitt vetrarkvøld gleið 55 ára gamli Ove Laursen í hálku og meiddi seg í økslina. Tá hann fór til kanningar á sjúkrahúsinum, vísti tað seg, at hann hevði krabbamein í lungunum, og at sjúkan var so álvarslig, at tað møguliga einki var at gera fyri at fáa heilsubót.

- Vit høvdu leingi ynskt okkum at fáa eitt barn, men eg hitti reis tvær ferðir, áðrenn tað eydnaðist. Hetta hendi alt um somu tíð. Vit vóru ógvuliga fegin, men eg vildi einki siga fyri familju og vinum, fyrr enn eg hevði verið í skannaranum og fingið vissu fyri, at alt var í lagi, sigur Beinta Laursen.

- Tá eg kom til skanningina, og alt var sum tað átti vera, hitti eg